**Katrin Dahl Jakobsen**
**Mikkjal Sørensen**
**Bjørt Samuelsen**
**Kári P. Højgaard**

**Broytingaruppskot**

**til**

**3. viðgerð av**

**løgtingsmál nr. 200/2010: Uppskot til løgtingslóg um serstakar treytir fyri makrelfiskiskapi í 2011**

Í § 3, stk. 2 verður sum 3. pkt. sett: "Um kvota, ið er keypt á uppboðssølu, verður avhendað, kann prísurin í mesta lagi verða keypsprísurin á uppboðssøluni, íroknað uppboðssølukostnaðin."

**Viðmerkingar**
Politisk semja er um, at forðast skal fyri, at kvota verður keypt á uppboðssølu bert við víðarisølu og vinningi fyri eyga. Tí verður skotið upp, at kvota, sum er keypt á uppboðssølu, ikki skal kunna seljast víðari fyri hægri prís, enn kvotan er keypt fyri á uppboðssøluni, íroknað sølukostnaðin.

**Á Løgtingi, 30. mai 2011**

| | |
|---|---|
| Katrin Dahl Jakobsen | Mikkjal Sørensen |
| Bjørt Samuelsen | Kári P. Højgaard |